# Ajax fær legendu sum venjara

Hollendska stórfelagið Ajax hevur boðað frá, at landsliðsvenjarin og fyrrverandi stórspælarin Marco van Basten skal venja liðið. Marco van Basten er í løtuni landsliðsvenjari hjá Hollandi, men eftir EM-endaspælið í summar, skiftir hann til Ajax at starvast. Í løtuni er Adrie Koster venjari í Ajax, men hann veit longu nú av, at hann sleppur ikki at halda fram eftir hetta kappingarárið.



# Átta á hálvum vølli

Fótbóltssambandi hevur í samráði við feløgini gjørt av, at frameftir verða 8 spælarar á liðum, sum spæla dystir á hálvum vølli. Higartil hevur regulin verið, at umframt ein málmann hava liðini seks útispælarar. Hildið verður, at tað er betri við sjey útispælarum, og tað skal roynast í hesum kappingarárinum. So hereftir verða dystir hjá smápilum, piltum, smágentum og øðrum liðum á hálvum vølli 8 móti 8.

# TB og finalistarnar vunnu

**Bert tríggir dystir vóru spældir í flogbólti um vikuskiftið, og vóru teir allir í Meistaradeildini hjá kvinnum. Báðir finalistarnar frá steypafinaluni byrjaðu landskappingina aftur við sigrum, eins og TB á heimavølli bastu einum skerdum KÍF liði**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Kvinnurnar hjá Fleyr megnaðu ikki at gera stórvegis mótstøðu, tá tær møttu einum SÍ-liði, sum skuldi reisa seg eftir finalutapið*

*Mynd: Álvur Haraldse*

Ungu TB kvinnurnar settu sær sum mál, áðrenn dystin, at KÍF skuldi sendast norð um suðuroyarfjørð aftur, við tapi í hendi, og so var.

### Byrjaðu væl

TB kvinnurnar løgdu væl fyri, longu í fyrsta setti, og góðar servur, umframt at allar kempaðu sera væl fyri hvørji aðrari, hevði við sær, at málið, tær høvdu sett sær undan dystinum, var rokkið.

Tey bæði fyrstu settini vóru rættuliga meinlík, og TB fór við teimum báðum, men so er tað triðja settið, ið altíð tykist trupult at vinna. Men við fýra dystarbóltum á rað móti endanum, eydnaðist tað TB at knúgva skerda KÍF liðnum, og harvið vinna sær tvey kærkomin stig í stríðnum um fjórða ella fimta pláss.

### Vit vóru væl betur

Virgar Djurhuus, ið er venjari hjá TB metir, at heimaliðið vann ein uppibornan sigur, og at tær allar sum ein kempaðu fyrimyndarliga.

– Hóast KÍF millum annað var Guðrið Syderbø fyri uttan, ið er í lestrarørindum í Danmark, so royndu tær eftir besta førimuni at fáa samanhangandi spæl, og onkuntíð eydnaðist tað teimum eisini. Men okkara gentir vístu í dag, at tær als ikki ætla sær at bakka. Vit ætla okkum onkrar sigrar afturat í ár eisini, sigur Virgar, ið metir seg hava góðar vónir til írestandi dystirnar í kappingarárinum.

### Ikki lætt at byrja aftur

ÍF kvinnurnar vóru ikki líka uppsettar í dysti teirra um vikuskiftið, sum tær vóru í síðsta vikuskifti til steypafinaluna, men hóast hesa sannroynd, so vunnu tær móti Drátti, og eru harvið enn beint í hølunum oddaliðnum SÍ.

Dráttur hevði eina betri byrjan í fyrsta setti, men ÍF kvinnurnar megnaðu tó at vinna settið 25-23. Nógvar misskiljingar vóru í spælinum hjá ÍF, og tær hildu ikki sínar avtalur sum tær høvdu sett sær fyri undan dystinum. So dysturin bleiv sera spennandi til tíðir.

ÍF megnaði tó at vinna 3-1 á Drátti, og eru tískil bert tað eina stigið frá oddaliðnum SÍ.

Seinasti dysturin hjá ÍF, er á heimavølli móti júst SÍ, har tær hava møguleika til at endurtaka bragdið frá í fjør, tá tær vunnu á stokkinum, í samsvarandi endaliga dystinum. Men tað fer uttan iva at vera ein torfør uppgáva, tí SÍ kvinnurnar ætla sær ikki at kapitulera, eins og tær gjørdu í steypafinaluni.

### Botnur móti oddi

Seinasti dysturin í Meistaradeildini hjá kvinnum var í Havn, har botnliðið Fleyr tók móti oddaliðnum SÍ. Sum stigatalvan eisini vísur, so er stórur munur á liðunum, og tað var tað eisini sunnudagin. SÍ vunnu greiðan sigur áljóðandi 3-0, og eftir settúrslitunum at døma var stóri munurin, sum man kundi vænta sær, komin til sjóndar.

Karin Mikkelsen, segði eftir dystin, at SÍ genturnar vóru sera nógv uppsettar til at vaska eyðmíkjandi ósigurin í steypafinaluni av sær aftur, og at fáa sjálvsálitið upp aftur.

- Vit stillaðu við sterkastu uppstilling, so at vit aftur knudu vísa, at finalan var ein keðiligur dystur, ið ikki hendur aftur. Vit vunnu samanumtikið sera greitt, sigur Karin Mikkelsen, ið er liðforkvinna á oddaliðnum úr Sørvági.

### Úrslitini

**Meistareadeild kvinnur**

| | |
|---|---|
| Fleyr-SÍ | 0-3 (13-25, 15-25, 10-25) |
| ÍF-Dráttur | 3-1 (25-23, 25-17, 23-25, 25-20) |
| TB-KÍF | 3-0 (25-15, 25-19, 28-26) |

# Bjørk vinnur eisini heima

**Bjørk Herup Olsen basti bæði veðrinum og mótstøðuni, tá fjórða umfarið í vetrarkappingini í renning var á skránni um vikuskiftið**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*www.athletics.fo*

Tað vóru stak vánalig rennilíkindir tá Treysti skipaði fyri 4. umfari av VetrarKappingini 2007/2008. Hesa ferð varð runnið í Hvannasundi. Tað var nógvur vindur sunnaneftir og nógv regn. Tað var tó minni vindur enn tað var á »Stovugólvinum« fyri fjúrtan døgum síðani. Nógvi vindurin hevði við sær, at tað var sera høg flóð og onkunstaðni eftir Fjøruvegnum fløddi yvir vegin og so mátti vassast nøkur fet.

Tey vaksnu runnu 10 km og børnini 4 km á einum góðum rundteini á 1.030 metrar. Málið var við Gamla Skúla, har eisini var møguleiki at skifta. Hóast baldrut veður, so komu allir luttakarar á mál í øllum góðum, við minnum um ein rennitúr sum seint verður gloymdur.

Úrslitið bleiv at hjá gentunum gjørdist Rebekka Fuglø úr Treystinum vinnari við 18,03 min. framman fyri Moniku Biskopstø úr Treystinum og Bjørk Reynagarð Svabo úr Frælsinum. Hjá dreingjunum gjørdist Regin Joensen úr Bragdinum vinnari við tíðini 17,51 min. frammanfyri Johannes Kristensen úr Bragdinum og John Viljam Johannesen úr Treystinum.

Hjá kvinnunum gjørdist nýkosni DM-vinnarin Bjørk Herup Olsen úr Bragdinum vinnari við tíðini 42,49 min. frammanfyri Fríðunn Steinberg (52,00) og Karin K. Petersen (54,26) úr Treystinum. Bjørk gjørdist samstundis vinnari hjá kvinnuunglingum.

Hjá monnunum gjørdist Guttorm Sørensen úr Treystinum vinnari við tíðini 38,26 min. frammanfyri Borgar Biskopstø (39,34)úr Treystinum, Andrias Hansen (40,16) úr Bragdinum og Jan Elmar Sørensen (40,25) úr Treystinum, sum gjørdist vinnari hjá mansunglingum.

Fimta og seinasta umfar í VetrarKappingini 2007/ 2008 verður í Runavík leygardagin 29. mars. Tá renna tey vaksnu 10 km og børnini 5 km.



*Bjørk R. Svabo og Andrias Hansen í mótvindi og regni. Í millum tey hómast Jan Elmar Sørensen, Henry Olsen og Fríðunn Steinberg*